VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Um kvøldið snarar hann í útnyrðing og ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið leygardagin:
Fyrrapartin lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin lækkar hann niður í útsynning og eitt skifti regn. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og regn av og á. Hitin millum 10 og 14 stig.

Reisigildi hjá Eimskip

Mikudagin varð nýggi bygningurin hjá Eimskip á Skansabryggjuni í Havn reistur. Bygningurin skal húsa bæði skrivstovu og vørugoymslu hjá felagnum.

BYGGING
Jón Brian Hvidtfeldt

Mynd: Jens Kr. Vang

6.juni í ár settu starvsfólkini hjá Eimskip spakan í eina ætlan, sum í desember skal gerast til ein 1500 fermetra stóran goymslu- og skrivstovubygning á Skansabryggjuni í Havn. Og mikudagin varð bygningurin so reistur. Linda Bjørk Gunnlaugsdóttir, stjóri hjá Eimskip í Føroyum, sigur, at tey ætla at hava reisigildi fyri starvsfólkunum 11. oktober.

Nýggja skrivstovan verður 300 fermetrar til støddar, og skal skapa betri umstøður fyri tey 26 starvsfólkini, sum í dag starvast dagliga á skrivstovuni hjá Eimskip.

Vørugoymslan verður tilsamans 1200 fermetrar, og talan er um ein framkomnan bygning við øllum teimum nýggjastu hentleikum innan goymsluøkið, siga tey hjá Eimskip.

Bingjurnar skulu framyvir fyllast og tømast inni í vørugoymsluni. Tær verða koyrdar heilt til dyrnar og tømdar gjøgnum serligar dyr fyri bingjur. Umframt vanliga vørugoymslu ætlar Eimskip eisini viðskiftafólkunum at goyma vøru á eini frígoymslu. Har kann vøran goymast ótollað, til hon verður tikin út eftir tørvi. Tað sparir kundanum gjaldføri, og kann hann senda vøru av landinum aftur ótollaða, um hann ikki fær brúk fyri henni.

Vøruhotel og -útkoyring er enn ein onnur tænasta, Eimskip fer at bjóða kundunum. Um kundin manglar goymsluplass í styttri ella longri tíðarskeið, kann hon liggja á goymslu hjá Eimskip.

Tað er byggifelagið M T Højgaard, sum stendur fyri byggingini hjá Eimskip á Skansabryggjuni í Havn. Linda Bjørk Gunnlaugsdóttir sigur, at tíðarætlanin heldur, og nýggi bygningurin verður klárur at taka í nýtslu 16. desember í ár.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	2
Nuuk	1
Qaqortoq	5
Ammassalik	6
Saint John's	14
Halifax	21
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	10
Lerwick	13
Aberdeen	16
London	19
Tromsø	2
Bergen	14
Oslo	–
Stokkhólm	12
Keypmannah.	17
Helsinki	5
Moskva	4
Berlin	17
Warzawa	15
Kiev	11
Bukarest	18
Paris	17
Madrid	16
Róm	22
Malorca	22
Athen	21
Malta	22
Tunis	25
Beijing	20
New Dehli	32
Bangkok	34
Jakarta	33
Sydney	29
New York	29
Miami	30
Los Angeles	18
Meksikobýur	–
Panama	31
La Paz	9
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	18

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 996 hPa yvir Atlantshavinum á 51N-36V fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.

Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 982 hPa á 54N-37V fer móti Grønlandsfjørðinum og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygardagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 01/10 kl. 06⁰⁰– 02/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 01/10 kl. 06⁰⁰– 02/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 2,3 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

23. sept.: Mánin longst frá jørðini
29. sept.: Seinna kvarter
6. okt.: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
4. okt.	05.26	17.51	04.26	16.51	04.41	17.06	07.26	19.51	08.26	20.51	03.41	16.06	02.41	15.06	05.41	18.06	06.41	19.06	05.11	17.36	06.26	18.51
5. okt.	06.14	18.38	05.14	17.38	05.29	17.53	08.14	20.38	09.14	21.38	04.29	16.53	03.29	15.53	06.29	18.53	07.29	19.53	05.59	18.23	07.14	19.38
6. okt.	07.01	19.24	06.01	18.24	06.16	18.39	09.01	21.24	10.01	22.24	05.16	17.39	04.16	16.39	07.16	19.39	08.16	20.39	06.46	19.09	08.01	20.24
7. okt.	07.50	20.16	06.50	19.16	07.05	19.31	09.50	22.16	10.50	23.16	06.05	18.31	05.05	17.31	08.05	20.31	09.05	21.31	07.35	20.01	08.50	21.16

5 707265 100050 >